# Pedagogar til Slóðina
## Bústovnur fyri ung

Á Slóðini, ið er bústovnur undir Almanna- og Heilsumálaráðnum, eru 2 fulltíðarstørv leys at søkja frá 1. januar 2005.

Slóðin er ein landsstovnur fyri ung í aldrinum 13 til 18, við m.a. skúla- og sosialum trupulleikum.

Vit vænta, at tey ið sett verða, eru før fyri at arbeiða sjálvstøðugt og í tøttum samstarvi við bæði vaksin og ung, og eru opin fyri nýggjum avbjóðingum.

Fólkini, ið sett verða, skulu vera útbúgvin pedagogar. Um eingin pedagogur søkir, kann annað starvsfólk verða sett í staðin. Lønin verður goldin eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Pedagogfelagið.

Umsóknir við avriti av prógvum, viðmælum v.m. skulu verða stovninum í hendi í seinasta lagi tann 25. november 2004.

Nærri fæst at vita um størvini við at venda sær til Terja Rasmussen, leiðara, á tlf. 31 50 30.

**Slóðin**
**Bústovnur fyri ung**
Sornhúsgøta 18
100 Tórshavn

*Gravarhjálp*

Marknagilsvegur 86
100 Tórshavn

*Tel 311723 - 511723 · Fax 321722*
*www.gravarhjalp.net*

# Vikarur

Søkt verður eftir lærara at byrja sum skjótast og helst skúlaárið út.

Starvið, sum er 20 lønartímar, er fyri lærara í sjúkrafarloyvi og verður lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið.

Lærugreinar: 2 t. kristni (8. fl.), 8 t. týskt (8. og 9. fl.), 4 t. enskt (10 fl.), 5 t. serundirvísing.

Fleiri upplýsingar kunnu fáast frá skúlastjóranum á tlf. 422084, 423098 ella 229885.

Umsóknir saman við ljósavriti av prógvi og møguligum viðmælum skulu vera Felagsskúlanum í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 12. november 2004.

**Felagsskúlin á Oyrarbakka**
v/ Hans Erland í Brekkunum
FO-400 Oyrarbakki

TEKNISKI SKÚLIN
TÓRSHAVN

## søkir
# lærara til maskindeildina

Starvið er eitt fulltíðarstarv.
Umsøkjarin skal hava sveinabræv sum maskinsmiður og minst 2 ára starvsroyndir innan yrkið.
Umsøkjarar við víðari útbúgving hava fyrimun.
Umsøkjarar, ið kunna undirvísa í stødd-, alis- og evnafrøði, í nýtslu av EDV, so sum: CAD/CAM, CNC hava somuleiðis fyrimun.
Á maskindeildini starvast 7 lærarar í føstum starvi, umframt tímalærarar og 1 verkstaðarhjálpari.
Á deildini er tað dagliga næmingatalið umleið 60, sum umfatar: Lærlingar og SIT-næmingar.

**Setanarkor til fast starv:**
Fyrstu 2 árini verða roknað sum royndartíð, har tann, sum verður settur í fast starv, má verða til reiðar at taka ta eftirútbúgving, tað verður seg pedagogiska/undirvísingarliga ella aðra førleikagevandi útbúgving, sum er neyðug fyri at verða settur í fast starv.

**Løn:**
Lønin verður sambært sáttmála millum Føroya Landstýri og FTL.

Starvið er sett at byrja 1. januar 2005.

Skrivlig umsókn við upplýsingum um útbúgving, viðmælum og starvstíð skal verða skúlanum í hendi í seinasta lagi týsdagin 23. november 2004.

Meira fæst at vita um starvið, við at venda sær til Helga Mortensen, leiðandi lærara á maskindeildini á tlf. 515872.

**TEKNISKI SKÚLIN Í TÓRSHAVN**
Marknagilsvegur 75 · Postsmoga 239
FO-110 Tórshavn
e-mail: tst@tst.fo
Heimasíða: www.tst.fo



**Vit hava termodraktir, regndraktir, regnsett, sjálvlýsandi vestar og gummistyvlar**

**Kaj Andreasen & Co**
Heilsøla · Smásøla · Umboð
Brekkutún 7 · 188 Hoyvík
Tel. 315600 - Fax 318008

**Landssjúkrahúsið**
Fo 100 Tórshavn

# Sjúkrarøktarfrøðingur /pleygari/ heilsurøktari

Fulltíðar farloyvisstarv antin sum, sjúkrarøktarfrøðingur, pleygari ella heilsurøktari í skiftandi vaktum á **Deild 2** er leyst at søkja til setan í tíðarskeiðium 1. desember 2004 til 31. mai 2005.

Deildin er ein akut viðgerðardeild. Á deildini starvast sjúkrarøktarfrøðingar, pleygarar og heilsurøktarar. Deildin er ein áhugaverd deild við nógvum avbjóðingum. Vit raðfesta samarbeið og trivna høgt, og at starvsfólkið er í støðugari menningin og arbeiða áhaldandi at betra um terapeutiska umhvørvið á deildini.

Arbeitt verður eftir kontaktpersónaskipanini og miljøterapeutiskum meginreglum. Deildin hevur tætt samstarv við aðrar fakbókar, bæði innan- og uttanhýsis.

**Setanartreytir:**
Løn og setanartreytir smb. sáttmálan millum avvarðandi yrkisfelag og Fíggjarmálaráðið.

**Upplýsingar um starvið:**
Meira um starvið fæst at vita við at venda sær til Birgit Andersen, deildarleiðara á D2 tlf. 304500, lokal 4002 ella til Bergit Weihe, leiðandi sjúkrarøktarfrøðing, lokal 4102, ella e-post bergitw@lsh.fo

Umsóknarfreistin er 23. november 2004 kl. 12.00.

Skrivlig umsókn, merkt »umsókn til starv« við avriti av prógvum, CV og viðmælum e.l. skal sendast til

**Landssjúkrahúsið**
Starvsfólkadeildin
FO 100 Tórshavn

*Á heimasíðuni hjá Landssjúkrahúsinum www.lsh.fo sæst meira um størv við at klikka á leinkjuna »starvsfólk«*

# Suðurstreymoyar Javnaðarfelag

**Opið hús í Jákupsstovu**
Týsdagin frá kl. 10.00 verður opið hús í Jákupsstovu, J. Paturssonargøta 24. Øll eru vælkomin!

**Koyring á valstaðið**
Ynskir tú at verða koyrd/-ur á valstaðið, so kanst túú ringja á telefon 262569.

**Valevnini á netinum**
Á heimasíðuni hjá Javnaðarflokkinum kanst tú lesa meira um valevnini o glesa greinarnar hjá teimum – far inn á www.javnadarflokkurin.fo

**Gott Javnaðarval!**



# BENT JÁKUP HANSEN

KANN IKKI LOVA GULL & GRØNAR SKÓGIR
MEN KANN LOVA TYKKUM:

ARBEIÐSSEMI & NÆRLAGNI
ERLIGHEIT & GEGNI
OPINLEIKA & VIRÐING

**TÍN ATKVØÐA - MÍN ÁBYRGD**

# VIÐ TÍNARI ATKVØÐU



**VERÐUR**
**ÁLIT**
**TRYGD OG**
**RÆTTVÍSI**
**FYRI ØLL Í KOMMUNUNI**

JÓI WINTHER
á lista C

# PARABOLÚTGERÐ

**STÓRT OG FJØLBROYTT ÚRVAL**
**TIL DØMIS:**

- Satelittmóttakarar: Dreambox og Echostar
- Skermar, ymiskar støddir
- LNB einkult og dupult, øll 0.3 db
- Polarmount
- Motorarmar og káplar til
- Modulir til móttakarar, fleiri sløg

**Hevur hettar tín áhuga, fæst meira at vita á heimasíðu okkara:**




WWW.SKY.FO
TEL 332174
ELLA 215328

Sosialurin
Sosialurin
i
Sosialurin
Sosialurin

FØROYA FELAG MÓTI KRABBAMEINI

# INNBJÓÐING TIL HÁTÍÐARHALD

Í SAMBAND VIÐ, AT FØROYA FELAGIÐ MÓTI KRABBAMEINI HEVUR 25 ÁR Á BAKI Í ÁR, VERÐUR HÁTÍÐARHALD Í KLINGRUNI Í NORÐURLANDAHÚSINUM Í FØROYUM FRÍGGJADAGIN 12 NOV. 2004 KL. 14:00

TILTAKIÐ ER ALMENT

***Skráin***

K 14.00 Tónleikastykki við børnum frá musikkskúlanum
Kl 14.10 Jákup N. Olsen, formaður í Føroya Felag móti Krabbameini, bjóðar vælkomin
Kl 14.15 Jóannes Eidesgaard, løgmaður og verji hjá Føroya Felag móti Krabbameini heldur røðu
Kl 14.20 Erik Wandall, yvirlækni og nevndarlimur í Føroya Felag móti Krabbameini, leggur fram hagtøl um krabbamein í Føroyum
Kl 14.30 Kristianna Hammer, sjúkrarøktarfrøðingur og cand.cur, heldur fyrilestur um vón og krabbamein
Kl 14.45 Tónleikastykki við Børnunum frá Musikkskúlanum
KL14.55 Turið Kjølbro, ritstjóri, leggur fram bókina Okkara millum, ið Føroya Felag móti Krabbameini gevur út í sambandi við, at felagið hevur 25 ár á baki
Kl 15.00 Pál Weihe, formaður í Listafelag Føroya, sigur nøkur orð um málningin/plakatina brot. Ið er gjørd í sambandi við hátíðarhaldið
Kl 15.05 Martin Joensen, tónaskald og listamaður, framførir eitt lag
Kl 15.10 Handan av bókum

Orðdtýrari verður Bjørt Samuelsen, tíðindakvinna

Høvi verður at keypa bókina "okkara millum" fyri 298 kr og plakatina "Brot" fyri 100 kr.
Øll inntøkan av søluni fer óskerd til Føroya Felag móti Krabbameini.

FØROYA FELAG
MÓTI
KRABBAMEINI